# Lagnudystur í Vágunum

*Sumbingar fara sunnudagin vestur í Vágarnar at møta FS Vágum, og hetta kann gerast teirra lagnudystur*

STEFAN Í SKORINI

Hetta er triðja árið, at Sumba er í bestu føroysku deildini, og tað er eitt gott avrik í sær sjálvum, men í ár tykist tað, sum at sumbingar ikki hava ta neyðuga yvirskotið at yvirliva. Teir hava fyrr megnað at gera fótbóltsskrivarar bilsnar av teirra avrikum, og tað er heilt vist, at sumbingar ikki gevast at stríðast fyrr enn seinasti dystur er spældur.

Teir hava bæði í hesum og í undanfarnum kappingum víst, at teir plaga at seta seg upp til teir týdningarmiklastu dystirnar. Í ár hava teir vunnið tveir dystir, og tað hevur verið ímóti FS Vágum og B71, sum bæði eru botnlið.

FS Vágar hevur hinvegin prógvað, at teir kunnu klára seg ímóti teimum betru liðunum, tí teir hava vunnið bæði á B68 og GÍ á heimavølli, og tað er har, teir eru serliga vandamiklir. Øll átta stigini eru fingin til vega á heimavølli, meðan allir dystirnir eru taptir á útivølli.

Sumba hevur heldur ikki gjørt nakrar skreytir norðanfyri Krossin, og FS Vágar er avgjørt favorittur at liggja omaná í lagnudystinum móti Sumba.

*Í fyrra dystinum millum liðini bæði eydnaðist sumbingum at vinna 1-0, og megna teir eina endurtøku í morgin, eru teir væl ávegis at tryggja sær enn eitt ár í bestu deildini*

Sumba eru betri mannaðir nú enn í fyrru hálvu, tá tað var heldur tunnligt við fólki, og ofta vóru trupulleikar at fáa ellivu mans til vega. Dánjal Jóhan Joensen, sum hevur verið við alt árið, er farin til Danmarkar í arbeiðsørindum, so hann verður ikki tøkur. Hinvegin eru tveir aðrir leikarar komnir fyri seg aftur eftir skaða. Talan er um Eirik Joensen, sum hevur verið skaddur seinastu tvær vikurnar, og Páll Magnar Kjærbæk. Páll Magnar varð skurðviðgjørdur í knænum fyri summarsteðgin, og hann er nú til dystin fús aftur. Páll Magnar hevur verið ein av høvuðsstuðlunum á liðnum, síðan teir komu í 1. deild á fyrsta sinni.

Vesturí í Vágunum eru allir menn tøkir uttan Tór-Ingar Akselsen, sum enn ikki er sloppin av við skaðan, hann fekk móti B36 fyri tveimum vikum síðani. Tað er ein dyggur smeitur ikki at hava Tór-Ingar við í hesum dystinum, tí hann er ein av teimum vágamonnunum, sum hevur víst mest í ár, og hann er eisini eitt av landsliðsevnunum hjá Allani Simonsen.

Um Sumba tapir sunnudagin, sær tað sera svart út hjá teimum, men so hava teir B71 vikuna eftir, og har er aftur ein týðandi botnuppgerð. Lagnan hjá sumbingum verður kanska avgjørd í tveimum næstu dystunum.

- Sumba er eitt lið av stríðsmonnum, og vit fara at berjast heilt til síðsta bríksl, sigur venjarin hjá sumbingum, Milan Cimburovic.

Hetta skulu vágamenn eisini hava í huga, tá teir fara á vøllin sunnudagin.

# Avgreiðsluspurningur hjá B36

*B36 eltir í løtuni oddaliðini, og ein sigur móti B71 í Havn tekur teir enn nærri toppinum*

STEFAN Í SKORINI

Um B36 skal spæla europeiskan fótbólt næsta ár, so er neyðugt, at teir eru millum trý tey fremstu, tá landskappingin er at enda komin. Í løtuni eru trý stig upp til VB og B68, so møguleikin er avgjørt til staðar.

Tveir teir seinastu dystirnir hava verið ímóti tveimum teimum niðastu liðunum, og nú møta teir sandoyingum, sum eru á triðniðasta plássi. B36 hevur fingið fulla úrtøku móti teimum niðastu liðunum í ár, og einki talar fyri, at teir ikki fara vinna sunnudagin á B71.

B36 spældi hóskvøldið ímóti AB í UEFA Cup, og kanska situr tann dysturin enn í beinunum, men eingin ivi er um, at venjarin Pelle Anderson heldur hugsar um eitt gott úrslit í landskappingini enn dystin ímóti AB.

Hjá B36 er Egil Zachariassen ivasamur, men hann verður væntandi klárur. Jákup á Borg er farin niður til Danmarkar í skúla, men hann kemur heimaftur til dystin móti B71.

Hjá B71 eru eingi leikbann ella skaðar, so allir menn eru tøkir hjá sandoyingum, og tað er eisini alneyðugt, um eitt gott úrslit skal fáast í Havn sunnudagin.

Seinast hesi bæði liðini møttust, vunnu havnarmenn 2-1, men tað var ein tepur sigur í einum tøttum dysti, har B36 als ikki var sannførandi. Tað er tó stórur munur á at spæla á Sandi og í Gundadali, og fyri B36 eigur hetta at vera ein avgreiðsluspurningur og trý stig fleiri í teirra jagstran av HB, VB og B68. Í B36 trúgva teir enn uppá meistaraheitið.

# Kann NSÍ halda dampinum uppi?

*Runavíkingar hava verið flúgvandi seinastu vikurnar, og teir stevna beint móti heiðursmerkjunum. Tað sær heldur ikki út til, at GÍ kann steðga teimum í løtuni*

STEFAN Í SKORINI

NSÍ hevur vunnið fimm av teimum seinastu seks dystunum, meðan hin endaði við javnleiki. Fýra tær seinastu ferðirnar NSÍ hevur verið á vøllinum, eru teir farnir av aftur við trimum stigum. Tað hava heldur ikki verið tey veikaru liðini, sum NSÍ hevur blást av vøllinum. KÍ, HB og VB eru millum liðini, sum seinastu tíðina hava verið við undirlutan móti NSÍ.

Spurningurin er so, um GÍ kann steðga teimum. Fyrra dystin millum liðini, vunnu gøtumenn 4-3 í Runavík við góðari hjálp frá gomlum NSÍarum. Óli Hansen og Helgi L. Petersen vóru millum málskjúttarnar ta ferðina.

Hetta er ein grannauppgerð, og tá er alt púra opið frammanundan. GÍ hevur einki at spæla fyri uttan æruna, men henni fara teir óivað at berjast við hond og fót fyri, kanska serliga tá mótstøðuliðið eitur NSÍ. GÍ hevur longu tryggjað sær luttøku í europeiskum fótbólti næsta kappingarár, og teir hava ongan møguleika at vinna heiðursmerki.

NSÍ er tó favorittur, av tí at teir hava víst sera gott spæl og skotið nógv mál í seinastu dystunum. Ein sigur er eisini neyðugur, tí enn eru hóast alt seks stig upp til heiðursmerkjaplássini.

Hjá NSÍ eru allir mans tøkir, so ikki er væntandi at Trúgvi Mortensen fer at gera nakrar stórvegis broytingar á liðnum. Christian Høgni Jacobsen hevur staðið fyri teimum flestu málunum eftir summarsteðgin, og hann eigur sín stóra lut í teimum góðu úrslitunum. Hansara leiklutur verður avgerandi fyri útfallið í Gøtu sunnudagin.

GÍ er júst komið aftur úr Svøríki, har teir hava spælt UEFA Cup móti Norrkøping. Hesin dysturin er kanska ikki heilt farin úr beinunum enn, meðan NSÍararnir eru betri hvíldir.

Dysturin sunnudagin móti NSÍ verður samstundis seinasti dystur hjá málverjanum Sunvardi Joensen í GÍ málinum á hesum sinni. Hann leggur nú leiðina til Danmarkar. Hallur Hansen, sum stóð í málinum í Svøríki, eftir at Sunvard varð rikin av vølli, fer nú at verja málið hjá gøtumonnum. Helgi L. Petersen, Bartal Eliassen og Súni Olsen fingu allir smásnuddir í Svøríki, men teir vera væntandi klárir aftur.

Spurningurin er so, um Jóhan Nielsen kann seta sínar menn upp til henda dystin, sum ikki er av stórum týdningi fyri teir, meðan NSÍ ikki kann brúka nakað annað enn ein sigur.

# B68 basir sjáldan KÍ á Svangaskarði

*Toftamenn, sum stríðast fyri at vera við í stríðnum um rætt til altjóða luttøku, hava næstu vikurnar sera torføror uppgávur á skránni*

Klaksvíkingar fara í morgin á Svangaskarð. Hagtølini siga, at tað verður torført hjá heimaliðnum. B68 og KÍ, sum í fyrradagin fylti 96 ár, hava verið saman í 1. deild síðani 1981. Í 1988 varð besta deildin víðkað til tíggju lið, og síðani tá hava B68 og KÍ spælt tólv landskappingardystir á Toftum. KÍ hevur vunnið seks ferðir, tríggjar ferðir hevur verið javnt, og B68 hevur vunnið tríggjar ferðir. KÍ hevur vunnið fýra tey síðstu árini. Síðsti B68 sigurin móti KÍ á Svangaskarði var í 1995. Tá var úrslitið 2–1. Samlaði málmunurin hjá B68 hevur verið 13–23.

### Stórir bitar

Síðani nakað fyri summarsteðgin hevur B68 spælt heimadystirnar á grasvøllinum. Men ímóti KÍ verður spælt á graslíkinum. KÍ plagar at standa seg væl á grasinum, og teimum líkar væl at spæla har. Men toftamenn bedýra, at tað er ikki tí, at teir halda tað vera sær sjálvum til fyrimunar, at teir flyta av grasinum og á graslíki.

Stórt trýst hevur verið á grasvøllinum í summar, og tað verður stórt trýst komandi vikuna. Landsdystur verður annan sunnudag. Føroyska liðið ætlast at hava fyrstu venjingina hóskvøldið, og ter fara ivaleyst at venja tvær ferðir fríggjadagin og leygardagin, umframt at slovenarnir fara at venja har leygardagin. Tí hevur B68 í vikuni vant á graslíkinum.

Á Toftum droyma teir um altjóða fótbólt komandi ár. Um atgongumerki skal vinnast til í hvussu so er UEFA, so er treytin í minsta lagið næstfremsta plássið. B68 er næstfremst, men skulu teir varðveita hetta plássið og kanska lyfta seg upp á fremsta plássið, so skulu stórar uppgávur loysast til fullnar. Aftaná at KÍ hevur verið á Svangaskarði, skal B68 til Runavíkar, so fáa teir vitjan av HB, áðrenn teir fara til Vágs og runda av móti GÍ á Svangaskarði.

Jan Petersen fær fáar minuttir ímóti KÍ í ár. Í Klaksvík fekk hann reyða kortið, og nú er hann leikbannaður. Arnbjørn Danielsen var leikbannaður á Sandi. Hann er tøkur aftur. So fæst at síggja, hvat vandamiklasta álopsparið í landinum fer at megna ímóti KÍ málinum.

### Allir eru tøkir

Í Klaksvík hava teir í venjingini í síðstu viku og í hesi vikuni spælt nógv til tvey stór mál. Tað hevur líkað spælarunum sera væl.

Tomislav Sivic hevur allar spælararnar tøkar, tá teir koma á Svangaskarð. Ímóti GÍ var liðformaðurn Jan Joensen burturstaddur, Nú er hann tøkur aftur. Spurningurin er so, hvat venjarin fer at gera við avloysaran síðsta sunnudag. Símun Waag Høgnesen stóð serliga í 1. hálvleiki sterkur í myndini.

JH



# Eins torført og væntað

*Frá at vera ein av føstu limunum í danska dynamittinum í áttatárunum, er Per Friman í dag stjóri hjá AB.*

*Eg var als ikki bilsin av, at talan gjørdist um ein torføran dyst hjá okkum, segði Per Friman eftir dystin*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

Spurdur um hann eftir dystin hóskvøldið hevði fingið eina øðrvísi fatan av føroyskum fótbólti enn hann hevði fyri 14 døgum síðani segði hann, at tað hevði hann sum so ikki:

- Eg hevði sæð fleiri dystir við føroyskum liðum áðrenn 8-0 sigurin hjá okkum, og eg varð als ikki bilsin av, at B36 í dag sýndi nógv betri spæl enn fyri 14 døgum síðani, helt hann fyri, tá hann varð spurdur, um AB kanska hevði undirmett B36 grundað á stórsigurin í fyrra dystinum.

### Rósti mótstøðumonnunum

Heilt nøgdir um spælið hjá egnu leikarum sínum tóktist Per Friman ikki at vera, og hann vísti eisini á, at teir alt ov ofta framdu óneyðug mistøk, tá bólturin skuldi spælast frameftir.

Hinvegin rósti hann eisini føroysku mótstøðumonnunum, tí hann eisini, at fleiri av AB mistøkunum stóðust av, at B36 í nógv størri mun megnaði at trýsta AB í hesum dystinum:

Eg haldi at B36 eigur stóran heiður av dystinum, og at teir eisini kunnu vera ernir um avrikið. Sjálvandi er man ikki heilt nøgdur, tá talan er um tap, men teir megnaðu at gera uppgávu okkara júst so torføra, sum eg hevði roknað við. Í verjupartinum vóru teir væl skipaðir, og tá talan er um somikið stórar leikarar, nyttar tað okkum einki at senda høgar bóltar móti brotsteiginum. Eisini megnaðu teir at leggja eitt hampuligt trýst á okkum seinastu løtuna, og móti endanum kundu teir eisini havt javnað til 1-1, um ikki málverji okkara hevði komið somikið væl út moti B36 áleyparanum (Magna á Lakjuni).

### Týdningarmikil sigur

Undan dystinum vard í fleiri donskum bløðum skrivað, at hóast AB at kalla hevði tryggjað sær víðari luttøku, so var tað av alstórum týdningi fyri danskan fótbólt, at teir eisini vunnu dystin á Tórsvølli. Hetta fyri at tryggja nøkur stig til UEFA roknskapin, sum er galdandi, tá avgerast skal, hvussu nógv lið einstøku londini fáa við í europeisku kappingarnar.

Spurdur um hetta hevði nakað at siga, svaraði stjórin, at tað hevði tað so avgjørt:

- Hetta var eisini nakað, sum vit royndu at siga leikarunum í dagarnar upp til dystin. Frá okkara síðu varð uppgávan tikin sera álvarsliga, og at vit góvu fleiri av føstu monnunum frí, komst ikki av, at vit bara vildu taka tað róligt.

Hann vísti í hesum sambandi á, at bæði Michael Johansen og Brian Sten Nielsen hava smávegis skaðar at dragast við, og at hetta var orsøkin til, at teir ikki vóru á vøllinum í dag.

### Komandi stórfelag

AB er annars eitt av teimum feløgum, sum veruliga hevur gjørt um seg í donskum fótbólti seinastu árini.

Tað eru ikki meira enn góð trý ár síðani, at felagið var í stórum vanda fyri niðurflyting. Um ársskiftið 97/98 settu teir so »Besta venjaran í Danmark (Christian Andersen)« í starv, og síðani hevur bara gingið framá.

Felagið er í dag eitt partafelag, sum við at fara á partabrævamarknaðin fekk einar 80 mió.kr. í eginpeningi. Sostatt gjørdist felagið brádliga eitt av teimum ríkastu í landinum, og hóast Christian Andersen seinni rýmdi til FCK, hevur hetta ikki nervað ítróttarligu gongdina í felagnum.

Per Friman hevur verið við í stórum parti av hesari framgongd, og hann dylur heldur ikki fyri, at hetta hevur verið ein spennandi tíð.

Spurdur, hvørji mál teir hava í framtíðini, og hvussu langt teir eru ávegis í hesum, svarar hann, at mál teirra er at vera við í toppinum av donskum fótbólti, umframt at verða ein »faktor« í europeiskum høpi.

- Fyrsta partinum av hesum hava vit longu partvíst rokkið, tí tey bæði seinastu árini hava vit verið millum trý tey fremstu í Danmark. Hvussu verður við hinum, er ringt at seta nakað áramál á. Eru vit hepnir við lutakasti og øðrum, kunnu vit væl koma væl áleiðis í ár, tí leikarahópurin er so avgjørt millum teir bestu í Danmark, og við fleiri landsliðsleikarum í hópinum, hevur liðið eisini tær royndirnar, sum eru so týdningarmiklar í hesum sambandi.

Ein stórur partur av hesum veldst tó um hepni, bæði í lutakasti og dystum. So er bert at vóna, at vit duga nóg væl at finna fram til hetta hepni, varð seinasta viðmerkingin vit fingu frá fyrrverandi landsliðsleikaranum, áðrenn vit ynsktu honum góða eydnu í víðari ferð teirra móti fótbóltstindunum.

# Pelle var nøgdur

*Venjarin hjá B36 var væl nøgdur um avrikið hjá sínum leikarum eftir dystin móti AB*

JÁKUP MØRK

Vanliga ber svenski venjarin hjá B36 orð fyri at vera ein sera blíður maður, men eftir dystin hóskvøldið tóktist smíl hansara at vera serliga stórt.

Orsøkin til góða lagið var eyðsæð. Lið hansara hevði veruliga reist seg, og hóast tað aftur hesa ferð varð talan um tap, so var stórur munur á avrikinum hóskvøldið á Tórsvølli og fyri 14 døgum síðani í Gladsaxe.

### Hildu høvdinum uppi

Í øllum førum var munurin á máltalvunum stórur, men Pelle Andersson helt tó ikki, at leikligi munurin millum dystrnar báðar var so stórur, sum tølini vísa:

- Tann stóri munurin er, at tá vit spældu í Gladsaxe skoraðu teir upp á allar sínar møguleikar, og eftir at teir innan fáar minuttir hóvðu skotið fimm mál, fóru vit fullkomuliga niður við nakkanum. Tað ferðina høvdu vit væl fatur í teimum fyrsta hálva tíman, og hetta megnaðu vit so at byggja víðari á í dag, og hetta eri eg sjálvandi nøgdur um.

Hann vísti eisini á, at tá tað í dag í nógv størri mun eydnaðist at halda AB leikarunum burtur frá málinum, viðførdi hetta, at B36 sum frá leið kom alt betri við í dystin. – Vit fingu í dag veruliga prógvað, at vit eisini kunnu vera við á hesum støði, og hetta er kanska tað mest positiva við dystinum.

### Carl var framúr

Spurdur, um tað var nakar einstakur leikari, sum hann var serliga væl nøgdur við, svaraði hann, at hann sum so var sera væl nøgdur um liðið.

- Eg haldi tó, at Carl (H. Høgnesen) var framúr í dag. Hetta var heilt klárt hansara besti dystur í ár, men eisini aðrir leikarar skaraður framúr.

Eisini helt nógv um avrikið hjá Mikkjali Thomassen á miðvøllinum, eins og miðverjan stóð seg sera væl, men sum hann segði, so kundi hann hildi áfram, til allir leikararnir vórðu nevndir, og metti hann tí fyrst og fremst, at talan var um eitt liðavrik.

### Spæla fyri at vinna

Hann vísti eisini í hesum sambandi á, at teir nú eru um at hava flestu leikarar tøkar aftur, og at hetta sjálvandi eisini hevur sína ávirkan. Ikki bara í hesum dystinum, men eisini í heimligu kappingini, har B36 framvegis hevur eitt orð at skula sagt.



*B36 venjarin duldi ikki fyri, at hann var fegin um avrikið hjá sínum leikarum*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

- Málið fyri komandi dystirnar er sjálvandi at vinna, hvørja ferð farið verður á vøllin, og so mugu vit síggja, hvussu langt hetta røkkur, var svarið, tá hann varð spurdur um, hvørjar vónir teir hava fyri írestandi dystirnar í kappingarárinum.

Her helt sviin annars, at B36 hevði lært nógv av dystunum móti AB. Lærdómur, sum teir eisini ætla at gera nýtslu av komandi dystirnar. Í øllum førum tykist vist, at um teir megna at varveita støðið frá dystinum hóskvøldið, verða teir tungir at syfta hjá teimum mótstøðuliðum, sum teir enn hava eftir á skránni

# Ferðin er høg

*Størsti munurin er leikferðin, heldur Klæmint Matras um tað at spæla í europeiskum høpi*

JÁKUP MØRK

Ein av ungu B36 leikarunum, sum fyri fyrstu ferð slapp at royna seg í Europa-Cup hóskvøldið, var miðvallarin, Klæmint Matras.

### Harðliga viðferð

Mest merkisverða við avrikið hansara var, hvussu ósmæðin hann fót inn í nærdystirnar við mótstøðumenninar, og hóast hetta kostaði nakrar ordiliga frammaná, so tóktist hetta ikki at nerva unga leikaran.

Hann helt tó, at fyri hansara viðkomandi hevði talan verið um ein sera harðan dyst, men kortini var tað ikki, sum hann beit mest merki í.

Munurin á ferðini er øgiliga stórur, tá tú spælir her, og so í landskappingini.

Hinvegin heldur Klæmint, sum júst er um at verða fastur fúsur á B36 liðnum, at B36 kann brúka dystin til nógv positivt framyvir:'

- Sjálvsálitið er nógv betri nú, og mál okkara eigur nú at vera at vinna teir dystir, sum eru eftir at spæla. Fer man ikki eftir tí, kann man akkurát tað sama lata vera við at spæla fótbólt, helt hann um komandi uppgávurnar.



*Hóast talan var um ein sera strævnan dyst, so tóktist Klæmint Matras tó fegin eftir dystin*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Uppgávur, har hann so avgjørt ætlar sær at verða ein partur av loysnini.